**Lærarastørv í Felagsskúlanum á Oyrarbakka**

Hesi størv verða lýst leys at seta frá 01. august 2011:

- 1 lærara í fast starv
- 2 lærarar í tíðaravmarkað størv skúlaárið 2011/12 fyri lærarar í farloyvi

Søkt verður eftir lærarum, sum duga at samstarva, eru virkisfúsir og fyrikomandi
eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, ábyrgdir og avbjóðingar, sum starvið og tíðin krevur
leggja dent á nærlagni, stundvísi, fakliga og námsfrøðiliga menning

**Førleikakrøv**
Tey, ið sett verða, skulu hava læraraútbúgving. Tó eru umsøkjarar við øðrum útbúgvingum eisini vælkomnir at søkja.
Skúlanum tørvar lærarar, ið kunnu undirvísa í framhaldsdeildini í m.a. hesum lærugreinum: landalæru, lívfrøði, alis- og evnafrøði, týskum, enskum, donskum, støddfrøði, ítrótti

**Lønar- og setanartreytir**
Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so er, at tey, sum sett verða, eru tænastumannasett frammanundan. Størvini eru lønt í lønarflokkunum 18.1 – 29.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Tímatalið til eitt av tíðaravmarkaðu lærarastørvunum verður ikki endaliga ásett fyrr enn 01. sep. 2011

**Umsóknir**
Umsóknir við CV og avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi 17. juni 2011 kl. 12.00

Nærri fæst at vita um skúlan og størvini við at venda sær til skúlastjóran, tlf. 21 20 84

Jón Ingi Ejdesgaard, skúlastjóri